

# TÆNASTAN TIL TEY FORVITNU

TÚ **VEIST** TAÐ KANSKA LONGU, **MEN** GERT TÚ **IKKI** TAÐ, SO ER TAÐ **UPP Á TÍÐINA**, AT TÚ **FINNUR** ÚT AV TÍ. **GOOGLE TRENDS** ER EIN **TÆNASTA** TIL ØLL TEY, IÐ ERU **FORVITIN** EFTIR AT VITA, HVAT **GRANNIN** SKRIVAR Á SÍNA **LEITIREGLU** Í GOOGLE. MEN **ALLARBEST** ER TAÐ FYRI **TEY**, IÐ LÝSA, STARVAST VIÐ **MARKNAÐARFØRING** OG FYRI OKKUM Í **MIÐLUNUM**



GOOGLE
Inaa Törnroos
inna@sosialurin.fo

Gitið nær danir vóru mest áhugaðir í navninum Eik! Vita tit? Um ikki, so er bara at fara inn á Google Trends og skriva Eik og velja Danmark sum øki. So síggja tit, at tað var í september í ár, tá Eik var í einari heldur truplari støðu, at danir leitaðu mest eftir Eik á alnótini.

Eisini ber til at síggja, at tað var í Ribe og Keypmannahavn, at áhugin fyri Eik var størstur.

Tey, sum starvast innan ferðavinnu, nýta ofta Google Trends – á donskum kallað Google Søgeindsigt.

Jákup Sverri Kass, marknaðarleiðari hjá Atlantic Airways, sigur, at tey nýta Google Trends, tá tey hava keypt Adwords frá Google fyri at síggja, hvat úrslitið er av teimum ymisku orðunum




*Liturin á heimskortinum vísur, hvar áhugin er størstur fyri Føroyum. Tess myrkari liturin, tess størri er áhugin*

– Vit hava keypt umleið 100 slík orð (search words) og skifta tey síðani út eftir, hvussu nógv úrslit tær ymisku kombinatiónirnar fáa, greiður hann frá.

Orð, ið verða nógv nýtt, blíva síðani flættað inn í lýsingarnar hjá Atlantic.

Hesin hátturin at nýta Google Trends er sera vanligur, og um ein leitar eftir Færøerne í Danmark kemur »Fly Færøerne« og »Atlantic Airways« høgt á listanum.

### Størstur áhugi um summarið

Leitar ein eftir »Faroe Islands« um allan heimin, fær ein eina góða mynd av, hvar áhugin fyri Føroyum er sum størstur, og hvat fólk vilja vita um okkara oyggjar.

Áhugin er størstur um summarið og londini, ið leita mest eftir »Faroe Islands«, eru Írland, Danmark, Stóra Bretland, Noregi og Kanada.

Tað eru oftani fótbóltsdystirnir, ið skapa nógvan áhuga. Tá fara tølini hjá www.atlantic.fo og www.visitfaroeislands.com í topp.

Rói Magnussen, fulltrúi á ferðavinnuráðnum greiður frá, at tá tey skipa fyri onkrum tiltakið í samband við ein fótbóltsdyst, kunnu tølini á